# Úrskurður Ítróttardómstólsins

## viðvíkjandi kæru frá Finni Helmsdal um FS Vágar

Á fundi tann 16. og 22. juni 2005 viðgjørdi Ítróttardómstólurin kæru frá Finni Helmsdal um FS Vágar, dagfest 28. desember 2004.

Í viðgerðini av kæruni hava allir 5 nevndarlimirnir luttikið: Anja Hovgaard, formaður, Anna Dam, næstformaður, Poul Hansen, Børge B. Hansen og Eyðbjørn Larsen. Eftir umrøðu mettu allir limir seg vera gegnigar at viðgera kæruna.

**Kæran**
Í kæruskrivinum frá 28. desember 2004 verður ført fram, at FS Vágar skal hava spælt í hvussu so er alt 2004 við tveimum ólógligum spælarum, tí hesir ongantíð eru skrásettir á fullgóðan og kravdan hátt hjá Fótbóltsambandi Føroya.

Kærarin metir ikki, at ein formlig kærufreist kann nýtast sum umbering fyri ikki at viðgera málið, tá lógarbrotið er endurtikið eitt heilt kappingarár. Tí verður kært um niðurstøðuna hjá kappingarnevndini hesum viðvíkjandi.

**Viðgerðin í dómsnevndini**
Við úrskurði frá 8. desember 2004 hevur dómsnevndin hjá FSF víst kæruna frá sær. Í sambandi við avgerðina vísir dómsnevndin til § 3 í "Reglugerð fyri dómsnevndir innan ÍSF og viðgerð av kærum", har ásett er, at

*"Ein hvør luttakari ella eitt hvørt felag, ið beinleiðis ella óbeinleiðis verður rakt av onkrum tilburði ella avgerð í sambandi við kapping ella annað innan virkið hjá sersambandinum ella deildarsambandinum, kann kæra tilburðin ella avgerðina."*

Tá kærarin undirskrivar seg sum føroying og lim í ítróttarfeløgum og áhugaðan annars leggur dómsnevndin til grund, at tað er sum slíkur, at Finnur Helmsdal kærir til dómsnevndina. Í framhaldi av hesum metir dómsnevndin ikki, at í nóg stóran mun beinleiðis ella óbeinleiðis verður raktur av teimum viðurskiftum kært verður um, og hevur hann tí ikki neyðturviligan ítøkiligan áhuga í málinum til at kunna kæra. Dómsnevndin staðfesti tí, at kærarin eftir nevndu § 3 í kærurgelunum hjá ÍSF ikki kann kæra tey í kæruritinum umhandlaðu viðurskifti inn fyri dómsnevndina. Tí gjørdi dómsnevndin av at vísa kæruna frá sær.

**Sakarevni**
Grundarlagið undir viðgerðini av kæruni er tilfarið, ið kærarin hevur latið Ítróttardómstólinum. Hetta er:

1. Kæruskrivið, dagfest 28. desember 2004
2. Skriv frá Ítróttarsambandi Føroya til kæraran, dagfest 16. desember 2004
3. Kæra frá Finni Helmsdal til Ítróttarsamband Føroya, dagfest 6. desember 2004
4. Grein úr Oyggjatíðindum (ikki dagfest)

Harumframt tekur viðgerðin støði í avgerðini hjá dómsnevndini hjá FSF í sama máli frá 8. desember 2004.

**Viðmerkingar frá Ítróttardómstólinum**
Yvirskriftin í skrivinum frá 28. desember 2004 er: "Kæra og ampakendar viðmerkingar til avgerðir og arbeiðshátt hjá kappingarnevndini hjá FSF". Grundað á hesa og upplýsingarnar og skjølini í málinum annars hevur Ítróttardómstólurin viðgjørt málið sum eina kæru um avgerðina hjá dómsnevndini hjá FSF frá 8. desember 2004, har kæran frá Finni Helmsdal, dagfest 6. desember 2004, varð avvíst.

Kæran er send Ítróttardómstólinum við skrivi frá 28. desember 2004, t.e. meira enn 7 samdøgur eftir, at partarnir hava fingið kunnleika til avgerðina, ið er kærufreistin sambært § 1, stk. 3, í reglugerðini fyri Ítróttardómstól ÍSF, sbr. § 10 í "Reglur fyri dómsnevndir innan ÍSF og viðgerð av kærum". Tá kærarin tó longu 6. desember 2004 hevur kært avgerð dómsnevndarinnar til ÍSF, t.e. áðrenn kærufreistin er farin, metir Ítróttardómstólunin, at kæran eftir umstøðunum má metast at vera innkomin rættstundis.

Ítróttardómstólurin er av teirri fatan, at ongar upplýsingar eru í málinum, sum benda á, at kærarin kann bólkast sum luttakari ella felag, ið beinleiðis ella óbeinleiðis verður raktur av onkrum tilburði ella avgerð í sambandi við kapping ella annað innan virkið hjá sersambandinum ella deildarsambandinum. Heldur ikki metir dómstólurin, at kærarin kann bólkast á annan hátt, ið kann javnmetast við omanfyri nevndu. Í framhaldi av hesum tekur Ítróttardómstólurin undir við sjónarmiðinum hjá dómsnevndini um, at kærarin grundað á § 3 í "Reglugerð fyri dómsnevndir innan ÍSF og viðgerð av kærum" ikki kann kæra um hesi viðurskifti, og longu av hesi orsøk eigur avgerðin hjá dómsnevndni um at avvísa kæruna at verða staðfest.

Um tey viðurskifti, kært verður um, møguliga hava staðið uppá í longri ella stytri tíð metir Ítróttardómstólurin ikki hava ávirkan á galdandi reglur um, hvør ið kann leggja mál fyri dómsnevndina. Hetta elvir tískil ikki dómstólinum til at taka aðra støðu.

Grundað á omanfyristandandi ger Ítróttardómstólurin soljóðandi

**úrskurð**

avgerðin hjá dómsnevndini hjá FSF um at avvísa kæruna frá Finni Helmsdal verður staðfest.

Anja Hovgaard　　Anna Dam　　Poul Hansen

Børge B. Hansen　　Eyðbjørn Larsen